# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Svein Rógvi givin í Neistanum

**Svein Rógvi Ljósstein gevst nú sum venjari hjá Neista-kvinnum. Fyribils tekur Claus Rasmussen sær av venjingini**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Svein Rógvi Ljósstein vandi annars Neistan í vetur, tá liðið bert var eitt mál í Vági frá einnum finalusessi, og partarnir høvdu eisini pappír upp á hvønn annan í eitt ár afturat.

Men á heimasíðuni hjá Neistanum verður staðfest, at felagið nú má finna sær annan venjara.

- Orsøkin er millum annað, at Svein Rógvi er í løtuni troyttir av at arbeiða sum venjari, stendur at lesa á heimasíðuni hjá Neistanum.

Fyribils verður tað Claus Rasmussen, sum skal venja Neista-kvinnurnar. Claus hevur áður vant mansliðini hjá Neistanum og StÍF, umframt at hann í drúgt áramál hevur verið venjari í Danmark.



*Svein Rógvi Ljósstein skuldi ætlandi eisini venja Neistakvinnurnar komandi kappingarár, men hetta verður nú av ongum*

## Oyggjaleikir á netinum

Heimasíðan til komandi oyggjaleikirnar á Álandi er nú klár til mongu brúkararnar.

Á slóðini, www.alandresults2009.com, ber til at síggja, hvussu einstøku íðkararnir standa seg í ymisku greinunum.

Eisini er yvirlit yvir metini í ymsu greinunum, skrá fyri einstøku dagarnar og sjálvandi eisini eitt samlað yvirlit yvir heiðursmerkjabýtið.

Ymiskt er, hvussu heimasíðurnar hjá leikunum hava riggað, og eitt nú var hetta ikki heilt optimalt á Rhodos fyri tveimum árum síðani. Men sum skilst ætla álendsku vertirnir, at úrslit úr kappingum skulu fáast í skipanina alt fyri eitt, tá kappingar eru av, soleiðis at talan støðugt verður um ein livandi portal við allar feskastu úrslitunum.

**-mørk**

**1. deild**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 13 | 8 | - | 3 | - | 2 | 30 | 14 | 16 | 27 |
| 2 | B71 | 13 | 8 | - | 2 | - | 3 | 30 | 17 | 13 | 26 |
| 3 | VB/S | 13 | 7 | - | 3 | - | 3 | 28 | 21 | 7 | 24 |
| 4 | TB | 13 | 6 | - | 4 | - | 3 | 22 | 20 | 2 | 22 |
| 5 | B68 | 13 | 6 | - | 2 | - | 5 | 29 | 21 | 8 | 20 |
| 6 | NSÍ | 13 | 6 | - | 2 | - | 5 | 24 | 26 | -2 | 20 |
| 7 | FC Hoyvík | 13 | 6 | - | 1 | - | 6 | 16 | 20 | -4 | 19 |
| 8 | Víkingur | 13 | 3 | - | 5 | - | 5 | 14 | 15 | -1 | 14 |
| 9 | Skála | 13 | 2 | - | 2 | - | 9 | 13 | 25 | -12 | 8 |
| 10 | MB | 13 | 0 | - | 2 | - | 11 | 13 | 40 | -27 | 2 |

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

Sosialurin
Lesið Sosialin - so eru tit við

VB/Sumba vann grannauppgerðina:

## VB/Sumba vann í gjárkvøldið 3-1 á TB

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Jón Krosslá Poulsen, Palla Augustinussen og Pól Thorsteinsson, við brotssparki, syrgdu við hvør sínum máli fyri, at VB/Sumba vann 3-1 á TB. Hálvleiksstøðan var 3-0.

Tað frættist av Eiðinum í Vági, at sigurin hjá heimaliðnum var uppiborin. TB royndi at trýsta eftir hvíldina, men hóast Josef Bassene var á blettinum fyri gestirnar, var sigurin ongantíð í vanda.

VB/Sumba er í løtuni á triðja plássinum í næstbestu deildini við 24 stigum, trimum stigum færri enn oddaliðið HB. TB er á fjórða plássinum við 22 stigum.

## Zivanovic aftur í Vági

**Nenad Zivanovic skal spæla við VB/Sumba komandi mánaðirnar**

FÓTBÓLTUR
*Uni Holm Johannesen*
*uni@sosialurin.fo*

Nenad Zivanovic fer eftir øllum at døma at spæla við VB/Sumba komandi mánaðirnar. Tað skrivar heimasíðan hjá felagsliðnum.

Zivanovic hevur tvær ferðir áður roynt seg í Vági. Miðvallarin spældi við felagnum í 2002, 2003 og aftur í 2005 og 2006. Seinastu tvey árini hevur hann umboðað íslendska Breiðablik.

Spæliloyvið og annað er framvegis ikki tryggjað, men tað verður vónandi í einum av komandi døgunum, skrivar heimasíðan.